# Jákup vardi Jacob

**Eitt sjey ára drúgt arbeiði kom at enda hósdagin, tá Jákup Reinert Hansen vardi ritgerð sína um lestrarnar hjá Jacob Dahl sum PH. D. ritgerð**

VERJA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*



*Jákup Reinert Hansen í miðjuni við konuni, børnum og foreldrum sínum. F.v. Mejnhardt, pápi Jákup, børnini Høgni og Elin, konan Johanna og mamman Judith.*

*Mynd: Heri á Rógvi*

Århus: Audiotorium 3 hjá Det Teologiske fakultet á Århus Universitet var fylt við eini 40 fólkum hósdagin. Teirra millum tosaðu kanska størra helvtin føroyskt millum sín. Væl omanfyri túsund kilometrar frá sínum sóknarbørnum á Sandoynni, skuldi sóknarpresturin seinastu 22 árini, Jákup Reinert Hansen, leggja síðstu hond á eitt sjey ára drúgt arbeiði. Eitt arbeiði, ið er vorðið til eina PH.D. ritgerð við heitinum „Mellem kor og skib, Jacob Dahls færøske postiller".

Jacob Dahl livdi í árunum 1878 til 1944. Í árunum 1918 til 1943 var hann Føroya próstur. Jacob Dahl umsetti eina ørgrynnu, og hann spældi ein ógvuliga týðandi leiklut í arbeiðinum at gera føroyskt til kirkjumál í Føroyum.

Ritgerðin hjá Jákupi Reinert tekur støði í lestrunum hjá Jacob Dahl, sum verða nýttir við deknagudstænastur. Hesir lestrar vórðu útgivnir í 1934 og 1938, men enn í dag verða hesir lestrar sera nógv nýttir.

- Tað, at lestrarnir hjá Dahl framvegis verða so nógv nýttir, fangaði mín áhuga og fekk meg at byrja at arbeiða við hesum, sigur Jákup Reinert Hansen.

Ritgerðin hjá Jákupi, sum eisini er útgivin, ferðast víða. Bæði gudfrøðiligir, søguligir og málsligir tættir eru tiknir við.

## Opponentar

At meta um eina tílíka PH.D. ritgerð verða tríggir opponentar valdir í eina dómsnevnd. Á føroyskum rópast ein tílíkur opponentur fyri andmælingur. Stutt fyri nýggjár lat Jákup Reinert Hansen dómsnevndini ritgerð sína.

Svenski professarin úr Lund Sven-Åke Selander legði fyri. Hann prátaði mest um bygna og metodu.

Síðani var tað Peter Martin Rasmussen, dómpróstur og dr.theol, sum greiddi frá um Jacob Dahl og hansara málpolitisku sjónarmið og ávirkan.

Nú skal tað heldur ikki ljóða meira álvarsamt, enn tað er. Tí andmælingarnir hava kunnað føroyska sóknarprestin um, hvat teir ætla at spyrja um, og tað var eingin vandi fyri, at ritgerðin ikki fór at vera góðkend sum PH.D. ritgerð. Bæði spurningar og svør vórðu givin oftast við einum breiðum smíli á varranum.

Formaðurin fyri dómsnevndina Eberhard Harbsmeier tók til síðst samanum. Hann spurdi nakrar áhugaverdar og skemtiliga spurningar og lat ongan iva vera um, at hann helt nógv um arbeiðið hjá Jákupi Reinert Hansen.

Dómsnevndin skuldi heldur ikki nýta nógv meira enn ein minutt at staðfesta, at ritgerðin var endiliga góðkend sum PH.D. ritgerð, og Jákup Reinert Hansen kann nú knýta heitið PH.D. afturat cand. theol.

## Eingin betri

Tað vóru ikki bert Jákup Reinert og teir tríggir andmælingarnir, ið tóku orðið við verjuna hósdagin. Áðrenn sjálv verjan byrjar spyr Per Bilde, sum leiddi verjuna hósdagin, um nakar í salinum hevur nakað at viðmerkja. Tað var bert tann eini millum áhoyrarnar, sum hevði hug at taka orðið. Men tað var heldur ikki ein og hvør. Christian Thodberg er kongaligur konfessionarius. Tað vil siga, at hann er prestur hjá kongshúsinum. Millum annað gifti hann Joachim prins og Alexandru prinsessu. Hann var fyrsti vegleiðarin hjá Jákupi Reinert Hansen í sambandi við ritgerðina.

Umframt at spyrja Jákup Reinert Hansen nakrar spurningar, nýtti hann eisini høvið til at rósa Jákupi fyri sítt arbeiðið við ritgerðini.

- Eg havi bíðað eftir hesum degnum í tíggju ár. Eg kundi als ikki ímyndað mær, at tað var nakar betri hóskandi enn tú (Jákup Reinert Hansen, blðm.). Eg legði til merkis tíni framúr evni fyri nógvum árum síðani. Ikki minst títt framúr góða danska mál. Eg havi eina sera stóra virðing fyri tínum arbeiði, og tað gleðir meg ómetaliga nógv at vera til staðar her í dag, segði Christian Thodberg millum annað.

Hann nevndi eisini, at Jákup á fleiri økjum var ósamdur við Jacob teologiskt - men tað skuldi hann ikki vera keddur av.

Christian Thodberg og onnur vóru á einum máli um, at vónandi heldur Jákup Reinert Hansen fram við sínum slóðbrótandi arbeiði. Ikki minst deknagudstænastan sum hugtak hevur stóran áhuga millum gudfrøðingar á Århus Universitet hósdagin. Og Jákup Reinert Hansen hevur neyvan skrivað síðsta orðið um Jacob Dahl ella deknagudstænastur.

*Jákup Reinert Hansen greiðir frá sínum arbeiði við lestrunum hjá Jacob Dahl. À myndini eru eisini Per Bilde, ið leiddi verjuna, opponentarnir Sven-Åke Selander, Eberhard Harbsmeier og Peter Martin Rasmussen.*

*Mynd: Heri á Rógvi*





*Roynt hevur verið at fingið fleiri fólk at gista, eitt nú bólkar við fólki, men tað hevur ikki eydnast í nóg stóran mun. Leiðari á Runavíkar Sjómansheimi seinastu árini hevur verið Kaj Eli Hansen av Nesi.*

*Mynd: Jonhard Hammer*

# Runavíkar Sjómansheim letur aftur

**Hóast umbyggingar og nútímansgerð hevur tað ikki eydnast at skapt tað virksemið á Runavíkar Sjómansheimi, sum leiðslan hevði vónað**

AFTURLATING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Komandi týsdag, sum er seinasti dagur í august, letur Runavíkar Sjómansheim aftur vegna fíggjarliga trongstøðu.

Eini 12 fólk starvast á sjómansheiminum, og hesi eru søgd úr starvi, nú lykilin verður snaraður um.

Fyri nøkrum árum síðan varð sjómansheimið partvís umbygt og nútíðmansgjørt. Øll kømrini vórðu sett í stand, og hølir vórðu innrættaði, soleiðis at fólk eisini kundu keypa sær pizza.

Men hóast umbygging og nútímansgerð, hevur tað ikki víst seg, at hetta hevur skapt tær inntøkur, sum leiðslan hevur vónað.

## Fáa gistingar

Hásesongin, sum fevnir um einar tríggjar mánaðir av árinum, hevur ikki givið tað íkast, sum vónað hevur verið, og heldur ikki hevur møguleikin at keypa pizza givið tað, sum lagt hevur verið upp til.

Runavíkar Sjómansheim hevur lagt seg eftir at fáa bólkar við fólki at vitja, men hetta hevur ikki eydnast í nóg stóran mun.

Gistingarnar hava verið ov fáar, og nógvar nætur í hásesongini hava bert nakrar fáar sengur verið umbidnar. Og tá ið hásesongin ikki roynist nóg væl, er heldur ikki lætt at fáa íløguna at bera seg.

Formaðurin í nevndini fyri Runavíkar Sjómansheimi, Andreas Andreasen, segði í vikuni, at arbeitt verður nú við, hvørjir møguleikar eru.

Hann segði, at ein møguleiki kanska er at lata resturatiónina uppaftur, men ikki hava gisting.

Enn er ov tíðliga at siga, hvussu verður við Runavíkar Sjómansheimi í framtíðini.

Kaj Eli Hansen av Nesi hevur seinastu árini verið leiðari á Runavíkar Sjómansheimi.

Á sjómansheiminum eru 19 kømur og 34 sengur.

**ítróttur**

Nr. 163 • leygardagur • 28. august 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

# Aftur gerandisdagur í Klaksvík

**NSÍ fer at gera sítt fyri at fella føðingardagsbarnið í egnum reiðri, men venjarin, sum í morgin fer at vitja í Klaksvík, ásannar, at KÍ eigur at hava potentiali til betri støðu, enn teir higartil hava rokkið**

KÍ-NSÍ
*Jóannes Hansen*




*Símun Joensen í atsókn ímóti málinum hjá Jens Martini í dystinum í fjør*

Týsdagin fylti KÍ hundrað ár. Meðan væleydnað móttøka var í stásiligu hølunum í endanum á ítróttarhøllini, runnu spælararnir á vøllinum norðanfyri høllina. Eftir djúpan leikligan og úrslitaligan aldudal var lagið týsdagin sjálvandi betri, enn tað hevði havt verið, um liðið einki hevði havt fingið við úr Gøtu.

Føðingardagsdysturin á heimavølli verður í morgin ímóti NSÍ, og KÍ venjarin, Ove Flindt Bjerg sær tað sum sína uppgávu at halda fokus á tí, sum skal ganga fyri seg á vøllinum og ikki á stásinum, sum felagið hevur verið óført at skipa fyri í sambandi við hundrað ára føðingardagin.

- Eg var ógvuliga væl nøgdur við avrikið og úrslitið í Gøtu. Spælararnir hildu seg hundrað prosent til tað, sum vit frammanundan høvdu avrátt. Vit høvdu rudduliga sigurin uppibornan, og í vikuni hava vit arbeitt víðari. Liðið ímóti NSÍ verður umleið tað sama, sum tað var í Gøtu. Men skiftisspælararnir stóðu seg eisini væl, so tað er tíbetur positivur trupulleiki, sum eg hesa ferð havi at taka støðu til, sigur Ove Flindt Bjerg.

*Hvat var tað, sum hendi í Gøtu?*

- Í fótbólti snýr nógv seg um tað, sum gongur fyri seg uppi í høvdinum á teimum, sum taka lut. Býráðsformaðurin bjóðaði okkum til Viðareiðis í síðstu viku. Har høvdu vit eina fína løtu saman, og spælararnir vístu í Gøtu, at teir vóru tendraðir. Vit høvdu gjørt einstakar justeringar á liðnum, og tær riggaðu væl. Tað gekk upp í eina hægri eind. Nú vóna vit, at vit á heimavølli fara at megna tað sama. Men vit kunnu ikki rokna við at sóla okkum til sigur. Tað skal arbeiðast.

Í Gøtu noyddist Eyðun Klakstein av vøllinum. Hann hevur vant í vikuni, og eisini Jacob Bymar, sum bað um at sleppa út, hevur vant við fullari ferð.

## Lyklaspælararnir eiga meiri

Hjá NSÍ hevur tað gingið væl síðstu ferðirnar, tá ið teir hava verið í Klaksvík, og tá ið teir undan summarsteðginum høvdu vitjan av KÍ, vunnu teir 3-1. Tá høvdu gestirnir sera lítið veiggj í sær.

Burtursæð frá stórsigrinum á Svangaskarði hevur tað hilnast illa hjá NSÍ síðani summarsteðgin. Tað hevur verið eyðsýnt, at hjá fleiri av teimum, sum leingi hava verið við til at mynda fótbóltin í Runavík, hevur tað verið trupult at finna rætta lagið.

- Sjálvandi hava vit møguleika at fáa stig og vinna í Klaksvík, og tað ætla vit okkum at gera. Allir spælararnir eru tøkir, men um tað skal eydnast er treytin, at allir spæla upp til sítt besta. Tað vita vit væl, at vit ikki hava gjørt síðstu ferðirnar, sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá NSÍ. Hann hevur síðstu ferðirnar roynt fleiri samansetingar á miðvøllinum.

*Hvat sigur tú um hundrað ára gamla KÍ?*

- Eg skilji á lagnum, at tað stemmaði væl hjá teimum í Gøtu. Eingin hevur ivast í, at teir eiga nógvar fínar spælarar. Bæði í føroysku kappingini og í altjóða høpi munnu teir vera millum teir mest royndu. Eg rokni við, at teir ógvuliga fegnir vilja vísa heimaáskoðarunum, at teir hava meiri í sær, enn støðutalvan vísir. Men vit fara eftir sigrinum, og eg rokni við einum undirhaldandi fótbóltsdysti.

# Todi ikki á landsliðið

**Undir venjing í fyrradagin varð hann so mikið knæskaddur, at tað fer honum ikki at bera til at spæla fótbólt næsta mánaðin**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað gongur striltið hjá Toda Jónsson at koma aftur á landsliðið. Fyri stórari viku síðani var hann smáskaddur í lærinum og fekk ikki spælt ímóti Malta. Nú er hann skaddur í knænum, og talan er um so mikið álvarsligan løst, at tað fer ikki at bera til hjá Toda at spæla fótbólt næsta mánaðin.

Eg havi fyrrapartin í dag verið til kanningar. Har fekk eg at vita, at tað er eitt liðband í knænum, sum partvís er slitnað. Teir siga, at eg skal binda fullkomuliga frið frá fótbólti í fýra til seks vikur, sigur Todi Jónsson úr Keypmannahavn.

Í fyrradagin fekk Todi Jónsson boð um, at hann var úttikin til landsdystirnar ímóti Sveis og Fraklandi. Todi hevur fleiri ferðir sagt, at hann hevur glett seg til at spæla á landsliðnum, nú hann leingi hevur kent seg vera væl fyri likamliga, men soleiðis verður tað ikki. Hvørki í Sveis ella á heimavølli ímóti Fraklandi verður Todi við, og tað er rættuliga ivasamt, um hann verður við á útivølli ímóti Kypros og Írlandi.

*Hvussu er hetta komið soleiðis fyri?*

- Tað var undir venjing fyrrapartin hósdagin. Síðani arbeiðssteðgin havi eg vant saman við hinum. Henda dagin var vøllurin eitt sindur vátur. Eg gleið og kendi, at tað segði klikk í knænum. Eg fekk ikki rættuliga sett beinið undir meg. Knæið blástist upp beinanvegin. Fysioterapeuturin helt beinanvegin, at talan var um liðbandsskaða, men tað bar ikki til at gera nærri kanningar, fyrrenn hovnaði knæið aftur var vorðið meiri vanligt. Tað var tað í morgun, og nú havi eg júst fingið dómin, segði Todi Jónsson á middegi í gjár úr Keypmannahavn.

Í fyrstu atløgu skal Todi binda heilt frið frá fótbóltinum. Hvussu venjingarstøðan fer at vera, tá ið landsliðið fyrst í oktober fer at ferðast til Kypros og Írland, man vera rættuliga ivasamt. Todi Jónsson harmast um støðuna, men eingin veit betri enn hann, at tað er einki at gera við sovorðið uttan at hava tol og stríðast fyri at koma fyri seg aftur.